# Gamalt handverk í nýggjum sniði

**HANDVERK Sigur onkur orðið Trøllanes, so hugsa fólk beinanvegin um landbúnað og tað sum hoyrir hesi vinnugreinini til. Men seinni í ár fer Trøllanes at koma á breddan í heilt øðrum sambandi, tá ein nýggj verkætlan fer av bakkastokki.**
**– Eg gleði meg at sleppa í gongd við hana, sigur jarnsmiðurin, Mikkjal Joensen**

Tekstur: Snorri Brend
Myndir: Jens Kristian Vang

**Trøllanes:** Umstøðurnar til jarnsmíð í dag kunnu ikki samanberast við tær, ið teir gomlu høvdu.

Nútíðar tøkni og hent arbeiðsamboð hava gjørt tað munandi lættari hjá hesum handverkarum at útinna yrkið sítt, bæði skjótt og væl.

Men nú ætlar Mikkjal Joensen sær undir eina verkætlan, nevnd Ecomonusée, har tað gamla handverkið skal aftur til heiður og æru – lið um lið við nýmótans handverk.

– Ja, hetta skal gerast tann fyrsta jarnsmiðjan sum arbeiðir við opnum eldi, eins og føroyingar gjørdu áður, vísir Mikkjal á.

Endamálið er at peppa tað gamla handverkið upp við essu og grúgvu, samstundis sum ein sær, at hetta kann geva pening av sær, – í dag, eins og áður.

Mikkjal hevur fingið ráðgeving og stuðul til verkætlanina frá Útoyggjafelagnum og aðrastaðni frá.

– Hetta ger eisini sítt til, at eg havi betri mót um at verkætlanin fer at bera seg.



> Eg dró eitt sindur uppá tað, tí at tað virkaði eitt sindur innviklað. Tað sum teir gjørdu har, virkaði at vera á sera høgum støði, – ja so høgt, at eg nærum misti pippið

### Fjós og handverk

At Mikkjal nú hevur sett sær hetta stóra og forvitnisliga málið fyri, kemur ikki av ongum. Hann hevur í roynd og veru fingist við jarn alt sítt vaksna lív.

– Eg havi faktist onga útbúgving sum so, men havi altíð havt áhuga fyri at skrúva sundur og saman, eins og so nógvir aðrir dreingir, greiðir hann frá.

Mikkjal er bóndasonur, og var hann tann sum annars skuldi taka yvir garðin frá pápanum. Teir bygdu í hesum sambandi eitt nútíðar fjós, sum stendur niðanfyri sethús hansara norðast í bygdini. Nógv er broytt síðani tá, tí í dag eru eingi neyt í fjósinum, men bert maskinur, tilfar og annað.

Í hesum sambandi komu evnir hansara sum jarnsmiður til sín rætt: Tá ein hevur við fjós og mjólkaframleiðslu at gera, er sjálvandi neyðugt at gera umvælingar við millumbilum.

Men tá ein býr so avsíðis í landinum sum Mikkjal ger, er ikki so einfalt ella ódýrt at fáa ein smið at koma allan vegin norður hagar at veita teimum eina einstaka tænastu.

– So vit gjørdu tað bara uppá tann mátan, at eg umvældi tað mesta sjálvur, greiðir hann frá. – Hetta førdi so aftur við sær, at eg mátti keypa amboð í hópatali. Og tey havi eg enn.

Til fyrimunar hjá honum var, at alt hetta frættist sum vera man, og so smátt byrjaðu fólk at koma til hansara við lutum, ið skuldu umvælast.

Ein dagin kom ein serligur gestur á gátt – Olga Biskopstø frá Útoyggjafelagnum. Við sær hevði hon eitt hugskot, ið hon helt vera júst tað rætta fyri hann.

### Blóð á tonnina

Hugskot hennara var henda verkætlanin, nevnd Economusée, sum hevur til endamáls at Mikkjal skal kunna arbeiða við opnum eldi, eins og smiðir áður gjørdu, samstundis sum hann skal vísa nýmótans handverk.

Útoyggjafelagið hevur fyrireikað seg væl, og hevði útvegað sær eitt filmsbrot frá eini smiðju í Kanada, sum arbeiddi eftir eini líknandi verkætlan við jarnsmíði. Var hetta nakað fyri Mikkjal?, vildi Olga hava at vita.

– Eg dró eitt sindur uppá tað, tí at tað virkaði eitt sindur innviklað. Tað sum teir gjørdu har, virkaði at vera á sera høgum støði, – ja so høgt, at eg nærum misti pippið, greiðir Mikkjal brosandi frá.

Nakað seinni ringdi Olga so aftur til hansara, og bjóðaði honum á eina ferð til Kanada, har tey millum annað vitjaðu verksmiðjuna hjá hesum smiðinum. Her fekk Mikkjal eisini fekk møguleika at arbeiða saman við hesum gamla og roynda manni.

– Nú fekk eg av álvara blóð uppá tonnina, ikki minst tí at eg fekk nokk at gera í smiðjuni. Eg fekk eisini stuðul til at fara víðari í ætlanini um tað gamla jarnsmíði, greiðir hann frá.

Og nú er so líkt til, at fyrsti parturin í hesi verkætlanini kann gerast veruleiki. Sum skilst er ætlanin at fara víðari og seta næstu verkætlanina á breddan, tá henda fyrsta er farin í gongd.

snorri@sosialurin.fo

